

## Venjarin koyrdur – Balling ikki bilsin

Í gjárkvøldið fekk venjarin hjá Ulrik Balling sekkin í Vejle. Eitt skifti fyri nøkrum árum síðani spældi Ulrik Balling NSÍ, men nú spælir hann í Vejle, har hann hevur skotið sjey mál í 21 dystum í Superliguni.

Vejle flutti upp í Superliguna í fjør, men liggur í løtuni aftast í deildini, og tí hevur venjarin Kim Poulsen fingið sekkin.

– Vit hava ikki fingið ta byrjan upp á várið, sum vit høvdu vónað. Men tað hava verið aðrar løtur, har tey hevði givið meiri meining at koyrt venjaran enn júst nú, sigur Ulrik Balling við Ekstra Bladet. Hann er kortini ikki bilsin um, at venjarin er koyrdur, men ivast í, um ein nýggjur venjari megnar at venda skútuni og bjarga Vejle og Balling undan niðurflyting.

# Stilli í Klaksvík í gjár

**Í góðveðrinum í gjár endaðu átta av teimum tíggju talvunum í 3. og 4. umfari í einstaklingakappingini remis**



TALV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir gjørdu skjótt av í Klaksvík í gjár. Í einstaklinga kappingini í talvi, sum hesa vikuna er í Skúlanum við Ósánna, endaðu øll fimm talvini í fjórða umfari, sum var seinnapartin, remis. Í fýra av talvunum tóku teir remis, áðrenn teir rukku tjúgu leikum.

Fyrrapartin var triðja umfar á skránni. Tá endaðu trý av fimm talvum javnt. Einastu vinnararnir í gjáramorgunin vóru Finnbjørn Vang og Olaf Berg, sum harvið tóku seg eitt vet inn á oddafiskarnar eftir fýra tey fyrstu umførini, veteranarnir Rani Nolsøe og IM John Rødgaard.

Úrslitini í 3. umfari: Finnbjørn Vang-Terji Petersen 1-0, Ólavur Simonsen-Rani Nolsøe ½-½, Torkil Nielsen-Sjúrður Thorsteinsson ½-½, Andreas Andreasen-Olag Berg 0-1 og Martin Poulsen-IM John Rødgaard ½-½.

Í fjórða umfari seinnapartin endaðu øll talvini remis: Terji Petersen-IM John Rødgaard, Olaf Berg-Martin Poulsen. Sjúrður Thorsteinsson-Andreas Andreasen, Rani Nolsøe- Torkil Nielsen og Finnbjørn Vang-Ólavur Simonsen.

Støðan eftir fýra umfør: Rani Nolsøe og IM John Rødgaard 3,0 stig, Olaf Berg, -Andreas Andreasen 1-0, Olaf Berg og Martin Poulsen 2,5 stig, Torkil Nielsen, Finnbjørn Vang og Sjúrður Thorsteinsson 2,0 stig, Ólavur Simonsen 1,5 stig, Terji Petersen 1,0 stig og Andreas Andreasen 0,5 stig.

Fimta umfar verður í dag klokkan 14. Tá sær skráin soleiðis út: Ólavur Simonsen-Terji Petersen, Torkil Nielsen-Finnbjørn Vang, Andreas Andreasen-Rani Nolsøe, Martin Poulsen-Sjúrður Thorsteinsson og IM John Rødgaard-Olaf Berg.

# Formulaliðið

**Aftur í ár mannar Ítróttarsosialurin Formulaliðið við leikarum, sum hava staðið seg væl hetta umfarið í Formuladeildini**




# Tríggir unglingar í hølinum á veterani

**Áhugin fyri at taka lut í FM í talvi er størri enn hann hevur verið fleiri av undanfarnu árunum. Tíggju luttakarar eru í 1. bólki, og 16 í almenna bólkinum**

TALV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fýra umfør er Jógvan Næs úr Havnar Telvingarfelag einsamallur á odda í 1. bólki. Jógvan hevur vunnið sær 3,5 stig. Einasti stigamissurin hjá veteraninum var í fyrsta umfari, tá ið hann við svarta fólkinum telvaði remis ímóti Rógva Egilstoft Nielsen úr Sandavágs Talvfelag. Í fjórða umfari í gjár vann Jógvan við svarta fólkinum á superveteraninum Gutta Petersen úr Sandavágs Talvfelag.

Næstfremst eru tríggir ungir klaksvíkingar, sum allir hava trý stig. Teir eru Rógvi Dragaberg, Tummas M. Sólsker og Ingolf Gaard.

Í almenna bólkinum eru eftir fýra umfør fimm telvarar stavn um stavn við 3,0 stigum. Teir eru Herluf Mortensen og Henry Berg úr Havnar Telvingarfelag, Mannbjørn Anthoniussen og Vagn Heldarskarð úr Klaksvíkar Talvfelag og Símun Skorastein úr Gøtu Talvfelag.

# Tætt í toppinum

**Eitt stig er frá teimum báðum, sum eru á odda, og aftur til tann, sum er á 9. plássi eftir fýra tey fyrstu umførini í unglingabólkinum í FM í talvi**

TALV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

22 unglingar telva í hesum døgum í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík um FM fyri einstaklingar.

Eftir fýra tey fyrstu umførini eru Bogi Hansen úr Klaksvíkar Talvfelag og Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavágstalvfelag á odda. Teir hava 3,5 stig í part. Oddafiskarnir dystaðust í gjár, og tá endaði tað við remis. Høgni Egilstoft Nielsen telvaði við hvíta fólkinum.

Tríggir telvarar hava 3,0 stig. Teir eru Heðin Gregersen úr Klaksvíkar Talvfelag, Heiðrikkur Jacobsen úr Havnar Telvingarfelag og Herborg Hansen úr Klaksvíkar Talvfelag. 2,5 stig hava Margar M. Berg, Havnar Telvingarfelag, Rúni Vormadal, Vestmanna Talvfelag, Vagnur Dam, Rókur og Dánjal P. Jacobsen, Klaksvíkar Talvfelag.

Í fimta umfari, sum byrjaði í dag kl. 14, er skráin hjá teimum fremstu: Bogi Hansen-Herborg Hansen, Heðin Gregersen-Høgni Egilstoft Nielsen, Heiðrikkur Jacobsen-Margar M. Berg, Rúni Vormadal-Vagnur Dam og Hjalti Toftum Jógvansson, ið er ein av fýra, sum hava 2,0 stig, skal telva ímóti Dánjal P. Jacobsen.